# Simme Musikkhús síðan 1959

Simme Musikkhús er eftir hondini ein gomul fyritøka, og handilin í Niels Finsensgøtu er í dag hin einasti í Føroyum, ið burturav fæst við sølu av ljóðførum og tilhoyri. Úrvalið mann ivaleyst verða tað størsta í Føroyum. Hetta er handilin, bæði til nýbyrjaran og hin professionella tónleikaran. Handilin veitir kundum sínum tænastur, bæði tá ið tað kemur til justeringar, viðlíkahald og umvælingar av ljóðførum - Petur Magnus Bjarnastein, ið rekur handilin, er sjálvur guitarbyggjari. Lítið hevur verið at hoyrt um Bjarnastein Guitars í seinastuni, og kemst tað av at nógv hevur verið at tikist við, síðani Petur Magnus yvirtók handilin. Men í komandi ári verður aftur farið undir at byggja guitarar. Guitarbyggingin fer nú fram í einum nýggjum verkstaði í høvuðsstaðnum.



*Petur Magnus Bjarnastein*




















